## Útisetin: Annfinn Hansen, Bagsværd

# Heldur ólavsøku á Bryggjuni

*Fert tú á ólavsøku?*

– Seinast eg var á Ólavsøku í Havn var einaferð í byrjanini av 90 unum. Eg fari neyvan aftur á ólavsøku í Føroyum, men meg minnist, at tá ið eg fór, legði eg altíð fyri við at hyggja eftir kappróðrinum. Onkuntíð fór eg til fótbóltsdyst uppi í Gundadali, men tað, sum mær dámdi best, var at spáka í havnar gøtum og hitta vinir og kenningar. At hugsa sær til, her kundi tú hitta fólk, sum tú ikki hevði sæð í mong Harrans ár. Hetta var bæði stuttligt og spennandi.

Soleiðis greiðir fuglfirðingurin Annfinn Hansen frá. Vegna búskaparligu kreppuna flutti hann saman við konu og børnum til Danmarkar í 1995. Tey búgva í eini sera hugnaligari íbúð í Bagsværd í útjaðaranum av Keypmannahavn. Børnini, trý í tali, eru flogin úr reiðri, og frítíðin fer við at sigla við seglbátinum, sum tey ognaðu sær fyri fáum árum síðani. Báturin hevur pláss í Svanemøllehavnini, og tá ið høvi býðst, og vindurin er góður, fara tey á flot.

Ólavsøkan hevur seinastu árini verið hildin á Bryggjuni úti á Amager, og soleiðis verður eisini í ár.

– Eg má viðganga, at eg eri ikki sørt bergtikin av hesum tiltakinum á Bryggjuni í Keypmannahavn. Umstøðurnar at hátíðarhalda ólavsøkuna eru avbera góðar. Eins og í Havn hevur tú møguleikan at keypa tær breyð við føroyskum viðskera, her er bæði føroyskur og enskur dansur, andalig møti og annað, ið hoyrir eini rættari ólavsøku til. Her havi eg verið seinastu árini, og mangt er sum bendir á, at soleiðis verður komandi árini, sigur Annfinn Hansen at enda.

*Tekstur: Símun úr Konoy*



***Fulgfirðingurin Annfin Hansen, ið býr í Bagsværd, gleðir seg til ein føroyskan bita á ólavsøku á Bryggjuni í Keypmannahavn***


